


ÚTSØLU
Endabrestur

Langan leygardag 27. september, selja vit allar útsølumeturvørur fyri upp í **50%** av útsøluprísinum

*Vitjið okkum í Dr. Jacobsensgøtu 16*

SEYMISKRÍNIÐ
Dr. Jakobsensgøta 16 • Box 320
110 Tórshavn • Tel 31 40 05

Sosialurin 341800

# Javni í gongugøtuni langa leygardagin

**I sambandi við at langur leygardagur verður í miðbýnum í Havn 27. sept. fer Javni at verða í gongugøtuni**

TÍÐINDASKRIV
*Javni*

Upprunaliga ætlaði Javni at hava eitt tiltak í Grasagarði í samband við Landsstevnuna, sum var í apríl mánaða, men veðrið var tíverri ikki til vildar tá, so tað tiltakið varð avlýst. Men nú fara vit at royna aftur. Tað er Javni, saman við Frítíðarklubbanum og M'as Blues Band sum skipa fyri.

Vit fara at hava ein bás í gongugøtuni, har Frítíðarklubbin selir kakao, bollar, sunkist og ballónir, ein lítil faldari um Javna verður deildur út, og harumframt verður eisini eitt spurnarblað, har tey, sum svara rætt, hava møguleika at vinna eina X-BOX, sum Farodane hevur stuðlað okkum við, ella fløgur av M'as Blues Band.

Eisini fer Beate L. Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd, hjá býráðnum at flyta fram røðu. Røðan hevur heitið "Havnin fyri øll".

Og síðst, men ikki minst, fara vælumtóktu M'as Blues Band, at syngja og spæla. M'as Blues Band fara í næstum at geva nýggja fløgu út. M'as Blues band hava serlig evni at fáa okkum øll í gott lag.



*Vælumtókta M'as Blues Band verða at hoyra leygardagin*

**Skráin sær soleiðis út:**

Kl. 11.00
Frítíðarklubbin selir kakao, bollar, sunkist og ballónir

Kl. 14.00
Beata L. Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd, flytur fram røðu við heitinum "Havnin fyri øll"

Eftir røðuna fara M'as Blues Band at syngja og spæla

Øll eru hjartaliga vælkomin í gongugøtuna leygardagin!

**ítróttur**

Nr. 182 • fríggjadagur • 26. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jákup kennir seg illa viðfarnan

**Føroyski málverjin heldur, at partar av skotsku pressuni hava ikki hildið seg til veruleikan, tá ið teir hava givið honum skoðsmál fyri avrikini higartil**

ÚTISETI Í SKOTLANDI
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Jákup Mikkelsen heldur seg onga orsøk hava at ivast í, at hann framvegis er fyrsta valið millum stólparnar hjá Partick Thistle. Tað ger hann, sjálvt um kappingarneytin hjá honum, Kenny Arthur, vardi málið leygardagin í 2–0 tapinum ímóti Dundee United og aftur mikukvøldið, tá ið Partick Thistle á útivølli ímóti 3. deildarliðnum Peterhead spældi seg víðari í steypakappingini. Úrslitið í tí dystinum var 2–2, og Partick Thistle var best í brotssparkskappingini.

– Eg havi verið sjúkur í meiri enn eina viku. Talan hevur verið um hálsbruna, tipta nøs, fepur og meiri av tí slagnum. Undan dystinum ímóti Dundee United leygardagin spurdi venjarin hjá okkum, Gerry Collins, meg, um eg var førur fyri at spæla. Tað var eg ikki, og so vardi hin málverjin málið. Men venjarin lat meg vita, at hann framvegis metti meg sum fyrsta valið, sigur Jákup Mikkelsen. Hann er um at koma fyri seg eftir sjúkuna. Mikukvøldið var hann við liðnum í Peterhead. Um hann verður millum stólparnar, tá ið Partick Thistle leygardagin skal spæla í Dunfirmline, var hann ikki greiður yvir eftir steypadystin í fyrrakvøldið.

– Í nátt fara vit at sova á gistingarhúsi í Dundee. Tað er á vegnum úr Peterhead og til Dunfirmline. Í morgin fara vit at venja á graslíkisvøllinum hjá Dunfirmline. Teir spæla heimadystirnar á graslíki. Tað hava teir sum einasta fealgið í bestu skotsku deildini undantaksloyvi at gera, vitsi Jákup Mikkelsen at siga mikukvøldið, tá ið hann og liðfelagarnir í bussi vóru á veg úr Peterhead og suðuryvir aftur.



*Jákup Mikkelsen hevur til tíðir verið ovfarin av ummælunum í skotsku bløðunum, og sjálvur kennir hann seg ikki altíð vera dømdan á røttum grundarlagi*

## Órímuligur kritikkur

Í pørtum av skotsku pressuni hevur Jákup Mikkelsen ikki fingið góð skoðsmál, síðani hann kom í málið hjá Partick Thistle at standa. Hann hevur verið niðurgjørdur sum vánaligur málverji, og tað hevur verið spurt og fregnast eftir, nær Kenny Arthur aftur fór at koma í málið at standa.

Hetta hevur ikki verið so ólíkt umrøðuni, sum eitt nú fleiri danskir fotbóltsútisetar áður hava sagt seg at hava verið fyri. Tá hevur ofta verið sagt, at tað hevur tykst, sum um tíðindamenninir hava staðið heimligu kappingarneytunum hjá donsku útisetunum nærri, enn teir hava kent seg at standa fremmandu spælarunum.

Hevur kritikkurin kenst órættur?

– Eg havi fleiri ferðir lagt hatta til merkis. Eftir 2–0 tapið ímóti Aberdeen sá eg í fleiri bløðum, at eg skuldi hava spælt heilt út av lagi vánaliga. Eg var ovfarin av ummælunum, tí eg metti meg sjálvan at hava spælt rættuliga væl. Tá ið teir fingu fyrra málið kom eg eitt sindur skeivur út í sambandi við frísparksinnlegg, men annars helt eg meg hava spælt heilt væl. Tí var eg ovfarin av umrøðuni í summum bløðum. Onnur helt eg hildu seg meiri til verjuleikan.

Ávirkar órímulig umrøða spælið hjá tær?

– Tú spyrt teg sjálvan, um metingarevnini eru farin av lagi. Síðani hava allir spælararnir hugt at upptøkuni av dystinum ímóti Aberdeen. Tá fekk eg staðfest mína egnu meting, og tað hevði eisini stóran týdning fyri meg, at venjarin segði seg vera væl nøgdan við avrikið hjá mær.

Men tit hava framvegis fyrsta sigurin til góða?

– Tað er undarligt, tí vit hava spælt væl í flestu dystunum. Men vit hava ikki havt marginalirnar við okkum. Úrtøkan hevur ikki verið nóg góð í álopsspælinum. Eg vóni ikki, at hetta fer at ávirka sjálvsálitið hjá liðnum, tí eg haldi, at vit eiga at vera nóg góðir til væl betri støðu, enn vit í løtuni eru í, sigur Jákup Mikkelsen úr Skotlandi.

# FM í einkultstarti fyri børn

**Leygardagin 27. september verður kappast í einkultstarti fyri børn. Sum nakað nýtt verður kappast uppi á Oyggjarvegnum. Hetta fyri at kappingin kann fara fram uttan ov nógv ferðsla órógvar kappingina**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Komandi leygardag kl. 16.00 skipar Tórshavnar Súkklufelag fyri FM í einkultstarti fyri børn. Kappingin er samstundis eitt punktum fyri kappingarárið 2003.

Hini árini hava børnini kappast á vegnum Yviri við Strond tá kappast hevur verið í einkultstarti, men av tí at ferðslan í Havnini er nógv økt seinastu árini hevur TSF valt, at flyta kappingina niðan á Oyggjarvegin, har væl minni ferðsla er.

Kappingin er sum sagt fyri børn, og aftur hesaferð hava gentur eisini møguleika at gerast meistari. Kappingin er fyri bólkarnar I, II og III, tvs. Børn frá 6 til og við 14 ár hava møguleika at kappast um føroyska meistaraheitið.

Tað er ongin treyt at luttakarin hevur eina kappsúkklu. Øll eru vælkomin at luttaka, og allar súkklur kunnu brúkast, men treytin er, at luttakarin nýtur hjálm.

Kappingin fer fram uppi á Oyggjarvegnum, og startur og mál er við Kleynisvarða. Luttakararnir skulu møta uppi á Kleynisvarða kl. 15.30.

Steyp og heiðursmerki verður til tríggjar teir fremstu súkklararnar í hvørjum bólki, og aftur hesaferð er tað Statoil Føroyar og Føroya Bjór, ið stuðla við steypi o.ø.

Heiðursmerkjahandanin verður í ÍSF-Húsinum eftir allar kappingarnar eru liðnar.

Tað ber enn til at tilmelda seg. Hetta verður gjørt við at ringja til ein av fyrireikarunum.